# Kunngerð

Vísandi til kunngerð frá innlendismálaráðnum fer kommunuval fram

**týsdagin tann 9. november 2004.**

Valið til Leirvíkar Bygdarráð fer fram á kommunuskrivstovuni.

Atkvøðutíðin verður:

**kl. 10.00 - kl. 20.00**

ella so leingi veljarar møta uttan steðg, og verður tá valið lýst liðugt.

**Brævatkvøður:**
Veljarar, ið verða burturstaddir valdagin ella á annan hátt lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu í seinasta lagi dagin fyri valið greiða brævatkvøðu við at venda sær til kommunuskrivstovuna.

Brævatkvøður skulu verða valnevndini í hendi innan valið byrjar kl. 10.00 tann 9. november 2004.

**Heimaval:**
Veljarar, sum vegna sjúku ella vantandi førleika, ikki kunnu møta við valstaðið, kunnu velja heima í seinasta lagi dagin fyri valið við at boða kommunuskrivstovuni frá - helst innan kl. 15.00 mánadagin 8. november 2004 á tlf. 443 006.

**Valkort:**
Valkort verða sent út við postinum. Um persónur, sum heldur seg hava valrætt í kommununi ikki fær valkort sendandi, verður viðkomandi biðin um at venda sær til kommunuskrivstovuna.

Mint verður á, at tygum eiga at hava valkortið við á val.

*Leirvík tann 22. oktober 2004*

**VALNEVNDIN Í LEIRVÍK**
Jacob Meinhard Sólbjørg, form.

# Vinnarar av lutaseðlasøluni hjá HB-stuðlum eru hesir:

| | |
|---|---|
| 101 | 1. vinningur (Íbúð P/F Høgni Mikkelsen) |
| 12947 | 2. vinningur (P/f Smyril Line) |
| 15244 | 3. vinningur (P/f Føroya Banki) |
| 3567 | 4. vinningur (P/f Føroya Shell) |
| 15504 | 5. vinningur (P/f SMS) |
| 6674 | 6. vinningur (P/f Atlantic Airways) |
| 3428 | 7. vinningur (P/f Atlantic Airways) |
| 17121 | 8. vinningur (P/f Flogfelag Føroya) |
| 20820 | 9. vinningur (P/f Føroya Bjór) |
| 14875 | 10. vinningur (P/f Hotel Føroyar) |
| 4207 | 11. vinningur (P/f Hotel Hafnia) |

Vinnararnir biðjast seta seg í samband við Sólbjørn Thomsen á tlf. 216755.

# Kunngerð

**Gjørt verður kunnugt, at niðanfyri nevndu valevnislistar eru innkomnir, og góðkenir av valnevndini, til bygdarráðsvalið 9. november 2004, í Kvívíkar kommunu**

**Listi A.**

| | |
|---|---|
| 1. Marjun Óladóttir Müller, bygdarráðslimur | Kvívík |
| 2. Randi Jacobsen, bygdarráðslimur | Kvívík |
| 3. Hjalmar Ingebrigtsen, bygdarráðslimur | Válur |
| 4. Boje Christensen, senior sergent | Kvívík |
| 5. Jón Thomasen, virkiseigari | Kvívík |
| 6. Jona Jensen, arbeiðskvinna | Kvívík |
| 7. Eyðun Lisberg, sølumaður | Kvívík |
| 8. Heri Müller, lærlingur | Kvívík |

**Stillarar:**

| | |
|---|---|
| Ari Johanneson, fulltrúi, | Kvívík |
| Heini Holm, borgarstjóri | Kvívík |
| Hannemi Hamrá, handilskvinna | Kvívík |
| Hans Martin Andreasen, arbeiðsmaður | kvívík |
| Poula Müller, sjúkrarøktarfrøðingur | Kvívík |
| Sunleif Nielsen, gólváleggjari, | Kvívík |
| Jóhan Thomasen, bussførari, | Kvívík |
| Niclas M. Joensen, skrivstovumaður | Kvívík |
| Doris í Dali, handilskvinna | Kvívík |
| Jákup Pauli Müller, sjómaður | Kvívík |
| Tóra Isaksen, húsmóður | Kvívík |
| Dánjal Petur Müller, timburmaður | Kvívík |
| Anna Petersen, ergoterapeutur | Kvívík |
| Kirstin Jacobsen, handilskvinna | Kvívík |
| Elsuba Iversen, skrivstovukvinna | Kvívík |
| Suni Dalsgaard, verkfrøðingur | Kvívík |
| Sonne Smith, blaðmaður, | Kvívík |
| Marjun Biskopstø, sjúkrarøktarfrøðingur | Kvívík |
| Gudrun Kjærbo, húsmóður | Válur |
| Ruben Olsen, sjómaður | Válur |
| Gudmar Suni Danielsen, maskinmeistari | Válur |
| Maibritt Trondesen, flakakvinna | Válur |

**Listi B**

| | |
|---|---|
| 1. Palle Rasmussen, bygdarráðslimur | Stykkið |
| 2. Árni Mortensen, bygdarráðslimur | Skælingur |
| 3. Tórarin Didriksen, maskinmeistari | Válur |
| 4. Soffi Egholm, psykoterapeut | Leynar |
| 5. Anna Petersen, sjúkrarøktarfrøðingur | Leynar |
| 6. Zacharias R. Jakobsen, maskineigari | Leynar |
| 7. Egil Petersen, montør | Kvívík |
| 8. Jóhanna Vang, skrivstovukvinna | Kvívík |
| 9. Rói Joensen, maskinmeistari, | Kvívík |
| 10. Páll Dam, teknikari | Kvívík |

**Stillarar:**

| | |
|---|---|
| Regin O. Djurhuus, arbeiðsformaður | Leynar |
| Bjarni Dam, sjómaður | Leynar |
| Augusta Egholm Petersen, lærari | Leynar |
| Elin Carlsson, krambakvinna | Stykkið |
| Eyðgunn Poulsen caféteriahjálpari | Válur |
| Juleif Durhuus, timburmaður | Válur |
| Beinta Nielsen, skrivstovukvinna | Kvívík |
| Súsanna Holm, skrivari | Kvívík |
| Jórun Jákupsdóttir, sjúkrarøktarfr. | Skælingur |
| Jan Christiansen, arbeiðsmaður | Stykkið |

**Tann 22. oktober 2004**
**Valnevndin í Kvívík**

**Tummas Marni Joensen, formaður**

**Landssjúkrahúsið**
FO 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøðingar til E3/E2

Hesi størv sum sjúkrarøktarfrøðingur í skiftandi vaktum á E3/E2 á Landssjúkrahúsinum eru leys at søkja til setan:

- heiltíðar avloysarastarv frá 1. desember 2004 ella eftir avtalu til og við 31. mai 2005
- heiltíðar avloysarastarv frá 1. januar 2005 ella eftir avtalu til og við 30. juni 2005
- fast heiltíðarstarv frá 1. desember 2004 ella eftir avtalu

Møguleiki er fyri lægri brøki.

E3 er ein medisinsk deild við 9 seingjaplássum. Sergreinin á deildini er uppvenjing av sjúklingum við apopleksia cerebri og við dis. sclerosu. Arbeitt verður í tøttum samstarvi við røktarstarvsfólk, fysioterapeutar, ergoterapeutar og talupædagog. Dentur verður lagdur á gott samstarv við avvarðandi og við primertænastuna.

E2 er ein røktardeild við plássi fyri 10 eldri búfólkum.Vit ynskja starvsfelagar við huga og hegni til at taka sær av eldri fólki. Dentur verður lagdur á góðan moral, etisk virði, positiva menniskjaáskoðan og góð samstarvsevni.

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni og góðar royndir við tvørfakligum samstarvi
- hollar royndir og fakligan áhuga innan sjúkrarøktina

**Vit kunnu bjóða**
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- ávirkan á fakliga menning
- góða innleiðslu

Upplýsingar um størvini eru at fáa við at ringja telefon 304500 til Monicu Brickmann, virkandi deildarleiðara, lokal 6012 ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, e-post asap@lsh.fo

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknarfreistin** er 15. november 2004 kl. 12.00.

Skivlig umsókn, merkt "umsókn til starv", við avriti av prógvum, CV, autorisatión, viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin

FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna "starvsfólk"*



# Kunngerð

**Valevnislisti til kommunustýrisvalið 9. november 2004 í Leirvíkar kommunu**

**Listi A.**

| | |
|---|---|
| 1. Dánjal Andreasen, maskinmeistari | Leirvík |
| 2. Jóhan Christiansen, skrivstovumaður | Leirvík |
| 3. Fríðgerð Heinesen, skrivstovufólk | Leirvík |
| 4. Hansa á Húsamørki, skrivstovufólk | Leirvík |
| 5. Poul Andrias Joensen, stjóri | Leirvík |
| 6. Randi í Jógvanstovu, egnari | Leirvík |
| 7. Allan Norðgerð, húsasmiður | Leirvík |
| 8. Joen Magnus Rasmussen, stjóri | Leirvík |
| 9. Ólavur Sjúrðarberg, lærari | Leirvík |
| 10. Jan Dam Vang, bilmekanikari, | Leirvík |

**Stillarar:**

| | |
|---|---|
| 1. Edmunda Langgaard, handilskvinna | Leirvík |
| 2. Óla Jákup Vatnhamar, skipari | Leirvík |
| 3. Elisabeth Hansen, lesandi | Leirvík |
| 4. Vagn Foldbo, aðalskrivari, | Leirvík |
| 5. Oskar Jacobsen, arbeiðsmaður | Leirvík |
| 6. Rúni Bjarkhamar, lærari | Leirvík |
| 7. Jógvan Jákup Jacobsen, arbeiðsform. | Leirvík |
| 8. Sámal Jákup í Jógvanstovu, rørsmiður | Leirvík |
| 9. Magnus Kristiansen, umsjónarmaður | Leirvík |
| 10. Jákup Tróndheim, el-innleggjari | Leirvík |
| 11. Marius Jacobsen, maskinmaður | Leirvík |
| 12. Fríðfinnur Johnsson, lærari | Leirvík |

# Stuðulsgrunnur Føroya Blindafelags

Umsóknir um peningaligan stuðul úr Stuðilsgrunninum skulu vera grunninum í hendi í seinasta lagi 12. november 2004.

Umsóknarbløð fáast hjá Føroya Blindafelag
Adr.: Føroya Blindastovnur
Íslandsvegur 10 A, Thn.
Boks 2074
FO-165 Argir
Tlf.: 31 82 22

Endamál grunnsins er:

At veita hjálp til blind og sjónveik, ið til fánýtis hava søkt um hjálp.

At veita stuðul til luttøku á skeiðum, fundum og øðrum tiltøkum fyri sjónbrekað í Føroyum og uttanlands - tó treytað av, at umsøkjarin er limur í Føroya Blindafelag.

**Nevndin**

# Pedagogur/ hjálparfólk

**2 fólk til barnsburðarfarloyvi**

Søkt verður eftir pedagogi/hjálparfólk barnsburðarfarloyvi, at byrja skjótast tilber, og fram til 31/12-2005. 25 tímar um vikuna.

Ein pedagog/hjálparfólk barnsburðarfarloyvi, at byrja 20/11-2004 til 30/6-2005. 29,75 tímar um vikuna.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**
- Hevur góð samstarvsevni
- Er røkin, nærlagdur og álítandi
- Nýhugsandi og ígongdsetandi

Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur við 3 stovum 12 børn á hvørjari í aldrinum 0-3 ár.

Løn eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunufelag.

Meiri fæst at vita, við at ringja til leiðaran á tlf. 313131 ella 317878.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmæli skal verða okkum í hendi seinast 12. november 2004.

**Vøggustovan á Konmansmýru**

# Postboðavloysari m/k til posthúsið í Leirvík

Søkt verður eftir einum tímaløntum avloysara m/k at bera post út í Leirvík skjótast møguligt.

Arbeiðið fevnir um avloysing í postútberingini í sambandi við frítíð, sjúku og aðra fráveru.

Viðkomandi má vera røkin, álítandi og kundavinarligur.

Nærri um arbeiðið fæst at vita frá posthúsleiðaranum í Leirvík.

Løn eftir sáttmálanum millum Føroya Landsstýri og Føroya Postfelag.

Skrivlig umsókn við møguligum tilmælum verður at senda til

**Postverk Føroya**
Avgreiðsla og Søla
Óðinshædd 2
100 Tórshavn

Postverk Føroya

**Føroya Psykiatrifelag**

# Aðalfundur

Ársaðalfundur verður tann 26. november 2004.

Fundarskrá: Sambært lógum felagsins.

**Nevndin**

# Kunngerð

Atkvøðugreiðslan í Vágs kommunu á kommunuvalinum týsdagin 09. november 2004 verður í samkomuhøll skúlans.
Atkvøtt verður frá

**kl. 10⁰⁰ til kl. 20⁰⁰**
ella so leingi veljarar møta uttan steðg.

Veljarar, ið sambært vallógini lúka treytirnar fyri at nýta brævatkvøðu, kunnu atkvøða á Býráðsskrivstovuni til og við mánadagin 08. november 2004.
Tey, ið vegna sjúku ella vantandi førleika ikki kunnu koma á valstaðið, kunnu velja heima til og við dagin fyri valið, men má boðað verða frá til Býráðsskrivstovuna tlf. 373024 í seinasta lagi kl. 15⁰⁰ henda dagin.

Gjørt verður kunnugt, at valkort verða send øllum veljarum, ið standa á vallistanum.
Veljari, sum ikki fær valkort, ella fær valkort við villum í, eigur at venda sær til Býráðsskrivstovuna sum skjótast

*22. oktober 2004*

**Valstýrið í Vági**

Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Móttøka

**Hildibjart Johansen**, stjóri á Lønjavningarstovuni, gevst vegna aldur tann 1. november 2004.

Vit vilja fegin nýta høvi at takka honum fyri trúgva tænastu og gott samstarv og verður í hesum sambandi almenn móttøka á **Hotel Hafnia**

***hósdagin, tann 28. oktober 2004 kl. 15-17.***

Tey, ið hava hug at heilsa uppá Hildibjart Johansen, nú hann gevst í starvinum, eru hjartaliga vælkomin á Hotel Hafnia hósdagin.

**Fiskimálaráðið**

# Aðalfundur

felagsins verður í MBF-húsinum
12. desember 2004, kl. 13.00.

**Felagið arm- og beinbrek**